Ár 2008, hin 19. juni

72.
2008-03-107 Byggilinjur fram við vegi, juni 2008.

Í samband við dagføringar av byggilinjum í byggisamtyktini er býarplansbólkurin komin til hetta tilmæli:
Galdandi fyri grundøkir við ábygdum sethúsum, plaserað nærri grannamarki enn 4 metrar.
Við eini hædd upp á í mesta lagi 2,5 metrar í mun til veg kann bilhús verða bygt millum hús og vegin treytað av, at bilhúsið verður sett javnfjart við vegin, soleiðis at útkoyringin ikki verður beinleiðis út á vegin/gongubreytina. Síðan móti vegnum kann hægst verða 8 metrar. Verður bygt móti tveimum markum (nærri enn 2,5 metrar frá marki), kann samlaða longdin móti báðum markum verða hægst 12 metrar.
Er frástøðan millum húsini og bakkant veg 5 metrar ella meiri, skal byggingin ikki kom nærri bakkanti enn 1 metur.
Byggi- og Býarskipanarnevndin tekur á fundi 9. juni undir við tilmælinum frá T.U. dagf. 9. juni 2008.
Tekniska Nevnd tekur á fundi 10. juni undir við tilmæli frá T.U. dagf. 9. juni 2008.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

73.
2008-02-12 Vegaføring – Stoksoyravegur/Faktorsvegur.

T.U. hevur gjørt uppskot um vegalinju fyri Stoksoyravegin og Faktorsvegin frá ætlaðu rundkoyringini við Klaksvíkshandilin og víðari út um Faktorhúsini.
Vegabreiddin verður 10 metrar, íroknað 2 metur breiða gongu-breyt í ovara og niðara borð.
Víst verður til tekning, dagf. 6. juni 2008 frá T.U.
Tekniska Nevnd tekur á fundi 10. juni undir við tilmæli frá T.U., dagf. 9. juni 2008.
Havnanevndin tekur á fundi 10. juni undir við tilmæli frá T.U., dagf. 9. juni 2008

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

74.
2008-02-011 Staðfesting av vegaføring út fyri matr.nr.1303 – Garðavegur.

Eigarin av matr. nr. 1303 søkir um loyvi til bilhús, men av tí at linjuføringin ikki er endaliga løgd føst, verður málið lagt fyri nevndina til støðutakan.
Kommunan lat í 1988 gera uppskot um linjuføring av Garða-vegnum, og við tað at linjuføringin fram við hesum strekki ikki er beint, blivu 2 uppskot gjørd.
T.U. mælir til at samtykkja uppskot 2 um vegaføring, og at tað framyvir verða givin byggiloyvir eftir hesari vegaføring.
Tekniska Nevnd tekur á fundi 10. juni undir við tilmæli frá T.U., dagf. 5. juni 2008.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

75.
2008-15-026 Marknaumskipan – lendi til landsveg.

Víst verður til skriv frá Landsverki, har sagt verður, at Umhvørvisstovan er komin fram til, at hvørt matrikulnummarið letur so og so stóra vídd til tunnilsvegin.
Fyri at nýggju markini endaliga kunnu verða sett, krevur Umhvørvisstovan, at eigarin hevur undirskrivað umsóknina um marknaskipan, so at marknaumskipanin kann verða avgreidd.
T.U. mælir til, at málið verður avgreitt sambært skrivi frá Landsverki, dagf. 14. apríl 2008.
Tekniska Nevnd tekur á fundi 10. juni undir við tilmælinum frá T.U., dagf. 6. juni 2008.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

76.
2008-03-055 Byggiloyvi til bilhús – matr. nr. 437az

Eigarin søkir um frávik til at byggja bilhús/bilskýli, sum stendur í vegmark. Sambært ásetingunum í byggisamtyktini mugu hús ikki verða bygd nærri vegamarki enn 3,0 metrar.
T.U. mælir í skrivi tann 11. apríl 2008 til, at ásetingarnar í byggisamtyktini verða hildnar.
Byggi- og Býarskipanarnevndin mælir á fundi tann 9. juni til at geva frávik sambært máli "Byggilinjur fram við vegi".
Tekniska Nevnd tekur á fundi tann 10. juni undir við BBN tann 9. juni 2008.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

77.
2008-01-001 Húsvognaøki í miðbýnum.

Í samband við Summarfestivalin og Sjómanndagin hava Norðoya Kunningarstova og Norðoya Bjargingarfelag heitt á T.U. um ávísing av øki til húsvognar.
T.U. mælir í hesum sambandi til, at miðstaðarøki verður gjørt búgvið til húsvognar, og at loyvi verður givið til at seta hús-vognar á økið í tíðarskeiðnum vika 32, 33 og 34.
Byggi- og Býarskipanarnevndin tekur á fundi tann 9. juni undir við tilmæli frá T.U., dagf. 6. juni 2008, og mælir annars til at finna varandi øki til húsvognaøki.
Tekniska Nevnd tekur á fundi tann 10. juni undir við tilmæli frá T.U., dagf. 6. juni 2008.
Havnanevndin tekur á fundi tann 10. juni undir við TN 10. juni 2008.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

78.
2008-01-045 Summarfestivalurin – Fyrireikandi fundir 2008.

Vístverður til samskiftið í samband við fyrireiking av Summar-festivalinum.
Kl. Kommuna hevur avsett Kr. 250.000,- men nú er komið fram, at ymisk arbeiði í samband við Summarfestivalin krevja eina meirjáttan uppá Kr. 260.000,-
Fíggjarnevndin krevur á fundi tann 16, juni, at umsitingin heldur seg til tøku avsetingina, tvs. innan fyri játtanina.
Ein minniluti í Mentunarnevndini:(Rani Nolsøe og Jórun Høgnesen), mælir á fundi tann 16. juni til, at Kr. 100.000,- verða útvegaðar meir til Summarfestivalin – hetta vegna 100-ára haldið.
Ein meiriluti í Mentunarnevndini (Erik Andreasen, Signhild Joensen og Kristian Eli Zachariasen) mæla til, at verandi játtan verður hildin, og at vaktarhaldið ikki verður borið av Klaksvíkar Kommunu.

Býráðsins samtykt: Broytingaruppskot (SOJ) tilmælið frá FíN - tó við tí broyting, at kr. 50.000,- verða funnar innan fyri verandi fíggjarkarm og játtaðar afturat - varð samtykt við 9 atkv. fyri og 1 ímóti (KEZ). HAB atkvøddi ikki.

79.
2008-02-009 Asfaltering av økinum kring Badmintonhøllina

Umsitingin mælir til, at økið kring Badmintonhøllina verður asfalterað, skipað og hampað fyri í mesta lagið Kr. 300.000,-.
Mælt verður til, at peningurin verður fíggjaður við flyting millum fylgjandi kontur:
Konta nr. 450825 – Fishing Angling Kr. 200.000,-
Konta nr. 260570 – Orkuverkætlan Kr. 100.000,-
Fíggjarnevndin tekur á fundi tann 16. juni undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 13. juni 2008, við tí broyting, at ístaðin fyri Kr. 100.000,- frá kontu nr. 260750 verða Kr. 150.000,- fluttar frá konto nr. 470800 "Kirkjugarðar, nýgerð Oyravegur eystur", tvs. íalt kr. 350.000,-.
Mentanarnevndin tekur á fundi tann 16. juni undir við tilmæli frá FíN, dagf. 16. juni 2008.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá FíN og MeN samtykt.

80.
2008-12-029 Nýtt Blákrossheim

Klaksvíkar Kommuna hevur eins og allar kommunur í Føroyum móttikið umbøn um fíggjarligan stuðul til bygging av nýggjum Blákrossheimi.
Søkt verður um Kr. 400.000,- í stuðli frá Klaksvíkar Kommunu.
Sosiala Deild vísir á, at talan er um eina verkætlan, sum eisini kemur okkara borgarum til gagns.
Sosiala Nevnd mælir á fundi tann 11. juni til at geva tilsøgn um stuðul upp á Kr. 400.000,- sum fellur til gjaldingar, tá ið bygg-ingin er liðug.
Fíggjarnevndin tekur á fundi 16. juni undir við SoN tann 11. juni 2008.

Býráðsins samtykt: Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at tilsøgnin verður galdandi í 5 ár.

81.
2008-17-045 Havnastjórin, lønarflokking og setanartilgongd

Sambært upplýsingum frá Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya verður mett, at havnastjórastarvið, ið ætlanin er at seta við Klaksvíkar Havn, eigur at verða lønt eftir lønarstigi 28 sambært sáttmála hjá Starvsmannafelagnum – vístverður til skriv í málinum.

Umsitingin mælir til at geva Havnanevndini heimild til at taka endaliga avgerð um setanina av nýggja havanastjóranum, eftir tilmæli frá umsitingini.
Fíggjarnevndin tekur á fundi tann 16. juni undir við skrivi frá umsitingini, dagf. 13. juni 2008, og gevur heimild til eisini at brúka konsulenthjálp, um hetta verður mett sum neyðugt.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá FíN samtykt.

82.
2002-03-114 Grundøki til Føroya Keypssamtøku – nýggj plasering

Víst verður til gongdina í málinum. Á fundi við Føroya Keypssamtøku kom fram, at Føroy Keypssamtøka ynskir at venda inngongdini ímóti Statoilstøðini/Nólsoyar Pálsgøtu, og varð dentur lagdur á, at fáa 100 parkeringspláss við inngongdina. Føroya Keypssamtøka gekk eisini við til, at bygt verður oman á teirra bygning.
KHR-Arkitektar hava síðani gjørt eina staðseting, sum nøktar ynskið frá Føroya Keypssamtøku (sí viðlagda kortskjal), og er henda staðseting í tráð við ynski frá býarplansbólkinum.
T.U. mælir til at samtykkja staðsetingina.
Ein minniluti í Byggi- og Býarskipanarnevndini (Rani Nolsøe)
tekur á fundi tann 9. juni undir við tilmælinum frá T.U., dagfest 5. juni 2008.
Ein meiriluti (Atli Justinussen, Erik Andreasen og Tummas Lervig) tekur støðu í býráðnum.
Ein meiriluti í Teknisku Nevnd (Kristian Fr. Olsen, Jórun Høgnesen, Rani Nolsøe og Signhild Joensen) taka á fundi tann 10. juni undir við tilmæli frá T.U., dagf. 5. juni 2008. Ein minniluti (Hans Arne Bertholdsen) tekur støðu í býráðnum.
Ein minniluti í Havnanevndini (Kristian Fr. Olsen) tekur á fundi tann 10. juni undir við tilmæli frá T.U., dagf. 5. juni 2008.
Ein annar minniluti (Kristian Eli Zachariassen) tekur ikki undir við málinum og vísir til parkeringsøkið við ferjuleguna.
Ein triði minniluti (Atli S. Justinussen og Hans Arne Bertholdsen) tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt: Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni. Tilmælið frá minnilutanum í BBN, og meirilutanum í TN og minnilutanum í HaN varð samtykt við 8 atkv. fyr og 2 ímóti (GvK og KEZ).

89.
2007-19-104 Samstarv og møgulig kommunusamanlegging Hvannasunds Kommunu
Víst verður til viðgerðina higartil, herundir býráðssamtyktina tann 29. apríl 2008, har býráðið, eftir tilmæli frá fíggjarnevndini, tók undir við uppskotinum til sáttmála.
Síðani eru onkrar broytingar gjørdar í sáttmálan, og tað er orsøkin til, at málið verður lagt fyri enn einaferð hetta fundarumfarið.
Málið um røktarheimið á Viðareiði verður tengt eitt sindur at hesum máli, við tað at sáttmálauppskotið leggur upp til, at um tann byggingin verður av ongum, skal arbeiðast við einum møguligum eldraheimi í núverandi Hvannasunds Kommunu. Fundur hevur verið við Viðareiðis Kommunu um tað málið , sum tó ikki er greitt enn.
Sum kunnugt er hetta síðsta umfar áðrenn summarsteðgin, og sum støðan er í løtuni, er ætlanin, at fólkaatkvøða v.m. verður í Hvannasunds Kommuni í august mánað.
Víst verður annars til fyriliggjandi uppskot til sáttmála, dagfest 28/5-08, og fundarfrásøgnina tann 28/5-08, har eitt yvirlit fæst yvir tær broytingar, sum eru gjørdar síðan býráðsfundin tann 29. apríl 2008.
Byggi- og býarskipanarnevndin 09. juni 2008: Málið verið til kunning.
Tekniska Nevnd 10. juni 2008: Málið verið til kunning.
Mentanarnevndin 11. juni 2008: Málið verið til kunnan.
Sosiala Nevnd 11. juni 2008: Málið til kunning.
Fíggjarnevndin 16. juni 2008: Nendin beinir fyriliggjandi uppskot til sáttmála í býráðið til umrøðu og samtyktar.

Býráðsins samtykt:

Samtykt, at fyriliggjadi uppskot til sáttmála verður lagt fram til endaliga støðutakan, tó við fylgandi broytingum:
-pkt. 5,18: áramálið verður tikið burtur.
-pkt.5,24: (Ískoyti): Eldraøkið verður at skipa í einari heildarætlan fyri økið.
-pkt.5,32: stadionøki: miðað verður ímóti at leggja eina rennibreyt á økinum, har vøllurin í dag liggur omanfyri á Fossanesi.